# Ikki líka mikið við ljóðinum

## Civic 30 ár



Síðan Honda Civic komu á marknaðin fyri 30 árum síðan, eru 14 milliónir bilar gjørdir. Civic er ein av mest seldu bilum í sínum klassa í Japan.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Alto við airbag



Suzuki Alto, ið framvegis verður gjørdur í Indien, fæst nú við dupultum airbag. Danski Suzuki innflytarin hevur enn ikki fingið bilin til rætta prísin.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Lexus uttan diesel



Hóast ynski frá fleiri marknaðum um at fáa Lexus við dieselmotorum verður tað ikki fyrr enn í fyrsta lagi í 2004 ella 2005, verður upplýst frá Lexus.

*Kelda: Motor Magasinet*



*Framkomin tøkni verður brúkt til at fáa tað heilt rætta ljóðið til bilin*

**Tá vit hugsa um nógvar av gomlu bilunum, sum vit minnast frá fyrr í tíðini, er tað ofta ljóðið, man hoyrir fyri sær. Serliga frá bilum við V6 og V8 motorum. Tað er ikki tilvild, men dýrgoldin háteknologi sum ger av, hvussu ljóðið á bilunum skal vera**

ÚTSTOYT
*Magnus Gunnarsson*

Ljóðið, sum kemur frá útstoytinum á bilum, er ikki einans ein tilvildarlig blanding av ljóðinum frá motorinum og útstoytinum, men er ein vísindi fyri seg sjálvan. Ljóðið verður fyrst skilt sundur og mált hvørt fyri seg, síðan verður tað sett saman aftur fyri at fáa tað heilt rætta ljóðið frá útstoytinum.

Uppgávurnar sum útstoytsverksmiðjurnar fáa frá bilverksmiðjunum verða alsamt størri og meira krevjandi. Tá ein nýggjur bilur verður konstrueraður, verður eisini hugsað um, hvussu hann skal ljóða. Serliga eru tað teir stóru og dýru bilarnir og sportvognarnir, ið skulu ljóða sum tað, teir veruliga eru.

Verkfrøðingarnir arbeiða við framkomnum konceptum. Teir hava til dømis eftirlit við óljóðinum, broytiligum geometri-skipanum og ymiskum katalysatorum. Eisini verður arbeitt við, hvussu ljóðið frá útstoytinum ávirkar ljóðið í kabinuni.



*Inni á ljóðgranskingarroyndarstøðini hjá Sebring. Her er tað ein BMW, ið skal hava tað heilt rætta ljóðið.*

# Speedometrið 100 ár

**Í 1902, sama ár sum Robert Bosch uppfann tendriproppurin, fekk Otto Schulze, ið var føddur í Strasbourg, patent uppá heimsins fyrsta speedometur. Speedometrið er í høvuðsheitum ikki nógv broytt hesi hundrað árini**

FERÐMÁLARI
*Magnus Gunnarsson*



*Otto Schulze fekk patent uppá tað fyrsta speedometrið í 1902. Í høvuðsheitum er speedometrið ikki nógv broytt hesi 100 árini.*

Áðrenn Otto Schulze kom við speedometrinum, var bert mett um, hvussu skjótt ið bilarnir koyrdu. Tað fyrsta speedometrið var rættuliga kompliceráð, men í 1907 vórðu nakrar broytingar gjørdar. Tá bleiv speedometrið standardútgerð í øllum nýggjum bilum, skrivar týska bilblaðið Auto Bild. Í høvuðsheitum er speedometrið ikki nógv broytt hesi 100 árini, men tað hava tó verið ymisk bilmodell, sum hava havt annarleiðis speedometur, sum t.d. teir gomlu Citroën GS og CX og sum vit síggja tað á Toyota Yaris við einum skíggja í miðjuni á instrumentborðinum. Tað heilt nýggja er, at speedometrið er eitt "head-up display" í framrútinum. Hendan skipanin verður nýtt á nýggjastu útgávuni av Chevrolet Corvette.

*Kelda: Motor Magasinet*



# Manningin á Nærabergi fekk longda jólafrítíð



*Næraberg hevur fingið ísetta eina fiskapumpu, sum fer at geva eina javnari tilgongd av rávøru og fer at hække góðskuna av framleiðsluni. – Í ár hevur Næraberg aftur fingið loyvi at royna í ES-sjógvi, so nú sær heldur bjartari út hjá okkum, sigur Hanus Hansen, stjóri.*

*(Mynd Rúna Sivertsen)*

**Tá verkfallið var av leygardagin, løgdu flestu skipini frá landi aftur. Men Næraberg má liggja nakrar dagar enn, orsaka av umvælingum í maskinuni. Skipið verður væntandi klárt at fara avstað aftur leygardagin**

FISKISKAPUR
*Rúna Sivertsen*

Nógv ungfólk eru við Nærabergi, og hjá teimum kemur helst væl við at fáa nakrar dagar eyka heima.

Við Nærabergi eru um 80 fólk, harav eru einar 20 kvinnur. Fleiri pør eru millum manningina, so ikki allir kunnu syngja við sanginum, "Nú má eg aftur fara... sig mær farvæl mín kæra".

Tá verkfallið var av, fóru flestu skipini avstað aftur, men Næraberg hevði fingið maskinskaða og mátti tískil liggja nakrar dagar.

### Nýggja fiskapumpu

Hanus Hansen, stjóri hjá JFK-Trol, sigur, at árið í fjør ikki var nøktandi hjá Nærabergi, men at tað nú sær heldur ljósari út.

– Vit hava fingið ísetta eina fiskapumpu, sum fer at geva okkum eina javnari tilgongd av rávøru og fer at hække góðskuna av framleiðsluni, sigur hann.

Hann sigur eisini, at teir aftur í ár hava fingið loyvi at royna í ES-sjógvi. Fyrrárið hevði Næraberg loyvi at royna í ES-sjógvi, og tað árið royndist heldur frægari enn árið í fjør.

Mannbjørn í Grund førir Næraberg, sum fer undir Føroyar at royna.

# Edmund ger einki meira

**Uppgávan hjá Edmundi Joensen er at vera løgtingsformaður hjá bæði samgongu og andstøðu, og tí setir hann ikki kanningina av embætisførsluni hjá Jørgin Niclasen á dagsskránna hjá løgtinginum, hóast tað var løgtingið, sum bað um frágreiðingina**

MISÁLIT
*Ingi Rasmussen*



Málið liggur í løgtinginum, og nú er tað upp til løgtingsmenn sjálvar at gera av, um kanningin og niðurstøðurnar skulu viðgerast í løgtinginum.

Soleiðis sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður, nú ein kanningarstjóri hevur gjørt sínar niðurstøður í málinum um embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen landsstýrismanni, tá lán vórðu umløgd í fjarfiskiflotanum.

Kanningin hevur ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin handlaði í heimildarloysi, tá hann legði lán hjá tveimum rækjutrolarum um og broytti veðrættarstøðuna hjá landskassanum, og tí er spurningurin settur við framtíðina hjá landsstýrismanninum.

Tað var fráfarni løgtingsformaðurin, Finnbogi Ísakson, sum eftur áheitan frá landsstýrismálanevndini setti Turið Debes Hentze advokat at fara ígjøgnum málið. Tá hon gav nýggja løgtingsformanninum kanningina, handaði Edmund Joensen hana víðari til allar tingmenn, og har liggur málið nú.

Róð hevur verið framundir, at løgtingið eisini eigur at sleppa at viðgera úrskurðin hjá kanningarstjóranum, tí tað var løgtingið, sum bað um frágreiðingina. Men Edmund Joensen, løgtingsformaður ger staðiliga vart við, at hansara lutur í málinum er lokin. Fyribils.

– Løgtingið hevur biðið um kanningina, og eg havi formidlað hana til løgtingsmenn. Nú er tað upp til løgtingsmenn at gera av, um nakað víðari skal henda við málinum. Teir skulu taka støðu, og ein og hvør løgtingsmaður kann reisa eitt misálit móti landsstýrismanninum, um hann vil tað, sigur Edmund Joensen. Uppgávan hjá tingformanninum er at umboða bæði samgonguna og andstøðuna, og tí setir hann ikki sjálvur málið á dagsskránna hjá løgtinginum.

– Tvørturímóti. Eg má vera so nevtralur og ópartískur sum yvirhøvur gjørligt, og tí mugu tingmenn sjálvir taka støðu, um eitt misálit skal setast fram, ella kanningin skal viðgerast í aðrar mátar, sigur Edmund Joensen.

Í løtuni liggur bólturin kortini hjá Anfinn Kallsberg løgmanni, sum bíðar eftir einari frágreiðing frá landsstýrismanninum sjálvum.

